# Brot á avtalu í samgonguni

**–Verður undirsjóvartunnilin undir Skopunarfjørð skumpaður afturum tunnilin ímillum Skálafjørð Havnina, er tað brot á avtalu í samgonguni, sigur Gerhard Lognberg**

Sandoyartunnil
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað kann ikki koma uppá tal, at undirsjóvartunnilin undir Skopunarfjørð skal skumpast afturum undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørðin og Havnina.

Tað sigur Gerhard Lognberg, javnaðartingsmaður úr Sandoy.

Tað hevur altíð ligið í kortunum, at tá ið Norðoyatunnilin var liðugur, skuldi undirsjóvartunnil til Sands verða næstur í røðini.

Men hesa raðfesting sáddi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, iva um í Útvarpi Føroya í farnu viku.

Har segði hann, at hann ivast ikki í, at undirsjóvartunnil kemur í Sandoynna, men at spurningurin er, nær hann kemur og tað varð ikki útihýst, at undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørð og Tórshavn varð tikin framum.

## Brot á avtalu í samgonguni

Gerhard Lognberg sigur, at verður Sandoyartunnilin skumpaður afturum, er tað rætt og slætt brot á avtalur í samgonguni og tað fer hann ikki at góðtaka.

– Tað hevur altíð verið sagt, at eftir Norðoyatunnilin skuldi farast í holt við Sandoyartunnilin.

– Eftir tilsøgnina um at parkera Listaskúlan til frama fyri Sandoyartunnilin, vórðu 500.000 krónur settar til kanningar.

Gerhard Lognberg sigur, at hann fer at krevja at peningurin eisini verður settur av til forkanningar næsta ár.

– Fái eg ikki tað, fari eg at taka tað sum at eg havi fingið ein rættiliga frammaná.

Hann sigur, at tað varð umrødd, at fólkagrundarlagið undir Sandoyartunlinum var ikki nóg mikið til at fíggja s Sandoyartunnilin, hóast Suðuroy verður tikin uppí soleiðis at Smyril skal sigla til Sands og síðani verður koyrt haðani til Havnar.

– Tað vita vit onki um, tí ongar kanningar eru gjørdar. Men tað fer at fáa ómetaligan økismenningarligan týdning, bæði fyri Sandoy og Suðuroy, at fáa Sandoyartunnilin gjørdan .

Hann spyr eisini um Eysturoyartunnilin ikki er ein luksustrupulleiki, tí har eru breiðir og góðir vegir frammanundan.

Tað hevur verið ført fram, at Skálafjarðartunnilin er privatur, men javnaðartingmaðurin í Sandoy setir spurnartekin við, hvussu privatur hann verður, tá ið avtornar.

Gerhard Lognberg sigur, at hann nú fyrst og fremst fer at tosa við floksfelagarnar í javnaðarflokkinum um støðuna og síðani við samgonunguna alla.

Og tað verður tað fyrsta hann fer at gera, nú tingið kemur saman aftur.

Hann vísir eisini á, at valfeløgini hjá javnaðarfokkinum , sambandsflokkin um og fólkaflokkinum í Sandoynni góðtóku at parkera ætlaða listaskúlan á Sandoynni við teirri treyt, at skjøtil verður settur á undirsjóvarunnilin ístaðin, tí tað sóu teir sum ta størra framstigið fyri Sandoynna.

Kortini heldur Gerhard Lognberg ikki, at tað hevur nakað endamál hjá honum einsamøllum at hótta við samgongusliti í eini so stórari samgongu.



*– Eg góðtaki ikki, at Sandoyartunnilin verður skumpaður afturum tunnil ímillum Skálafjørð og Havnina og tað hevði eisini verið brot á avtalur í samgonguni, sigur Gerhard Lognberg, tingmaður í samgonguni*

# Brot á vallyftini hjá øllum flokkum

Sandoyartunnil
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Eg hvakk við, tá ið eg hoyrdi tíðindini í Útvarpinum.

Tað kom óvart á Páll á Reynatúgvu, tingman úr tjóðveldisflokkinum, tá ið hann hoyrdi í útvarpinum í farnu viku, at hurðin nú er gloppað fyri, at tunnilin av Skálafirði til Havnar skuldi takast framum Sandoyartunnilin.

Tað hevur annars ligið í kortunum, at tá ið Norðoyatunnilin var liðugur, skuldi undirsjóvarunnil til Sands verða næstur í røðini.



*– Verður undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørð og Tórshavn tikin framum undirsjóvartunnil til Sands, er tað brot á vallyftini hjá øllum flokkum í Sandoynni, sigur Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin*

Men hesa raðfesting sáddi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, iva um í Útvarpi Føroya í farnu viku.

Har segði hann, at hann ivast ikki í, at undirsjóvartunnil kemur í Sandoynna, men at spurningurin er, nær hann kemur og tað varð ikki útihýst, at undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørð og Tórshavn varð tikin framum.

– Høvuðsmálið í valstríðnum í Sandoy uppundir seinasta løgtingsval var nettupp undirsjóvarutnnilin og allir teir størru flokkarnir lovaðu at farast skuldi undir undirsjóvartunnil til Sandoyar í hesum valskeiði.

Tí undrar tað hann stórliga, at møguleikin at taka Skálafjarðartunnilin framum, yvirhøvur verður nevndur .

Hann sigur, at bólturin liggur hjá samgonguni og tað vil vísa seg, tá ið fíggjarlógin kemur fyri í heyst, um ætlanin er at játta neyðuga peningin til framhaldandi kanningar.

– Eg haldi eisini at tað er skeivt at hyggja eftir Sandoyartunlinum sum eitt mál fyri Sandoy burturav.

– Tað tykist ikki sum um at politikararnir síggja tann møguleika, sum Sandoyartunnilin gevur fyri at binda alt Suðurøkið í Føroyum saman og at binda tað saman við meginøkið, tí verður sandoyartunnilin gjørdur, hevur tað verið upp á tal Smyril skal sigla ímillum Suðuroynna og Sand.

– Sostatt er fólkagrundarlagið undir Sandoyartunlinum ikki bara tey 1500 fólkini í Sandoy, men eisini tey 5000 fólkini, sum búgva í Suðuroy, sigur Páll á Reynatúgvu

Tosað hevur verið um at tunnilin undir Skálafjørð skal verða á privatum hondum og fíggjast av privatum.

Páll á Reynatúgvu sigur, at tað vísir seg mangan, at slíkar stórar ætlanir enda hjá tí almenna, so ella so.

– Og skal tað koma upp á tal hjá landinum at veðhalda fyri Skálafjarðartunnilin ella at vera við í ætlanini á nakran hátt annars, skal Sandoyartunnilin gerast fyrst, tí tað er longu fast samband ímillum Skálafjørð og Havnina frammanundan.

Páll á Reynatúgvu vísir eisini á, at valfeløgini, at valfeløgini hjá javnaðarflokkinum , sambandsflokkinum og fólkaflokkinum í Sandoy, góðtóku at parkera ætlaða listaskúlan á Sandoynni við teirri treyt, at skjøtil verður settur á undirsjóvarunnilin ístaðin, tí mett varð, at tað hevði nógv størri týdning fyri oynna.